Liðini áttu hvør sín hálvleik, og tá EB/Streymur hevði sínar kjansir í fyrra hálvleiki, var Valdemar Nowicki ein sannur brandur í málinum
Savnsmynd

B71 og EB/Streymur aftur á vøllin í dag

B71 vann týskvøldið 1–0, men dómarin metti ikki, at tað var nóg ljóst at fara undir longdu leiktíðina

ENDAUMFAR
Jóannes Hansen

Tað gongst striltið at fáa greiðu á, um EB/Streymur skal halda fram í bestu deildini, ella um B71 skal flyta upp aftur í 1. deild.

Avgerðin skuldi havt verið fallin á Sandi týskvøldið. B71 vann 1–0. Málið skoraði miðvallarin í vinstru, Símun Hansen, tá seinna umfarið var eitt korter gamalt. Tað var rættuliga undirhaldandi og ferðmikið. EB/Streymur hevði í 1. hálvleiki tveir møguleikar at skora avgerandi malið á útivølli, men Valdemar í B71 málinum var sera kringur. Í 2. hálvleiki var B71 omaná, og tá kundu teir havt fingið fleiri mál enn tað, sum teir skoraðu.

Úrslitið var nett tað sama, sum tá EB/Streymur sunnudagin vann á heimavølli. So stóð á jøvnum 1–1. Reglurnar siga, at tá skal spælast tvær ferðir fimtan minuttir longd leiktíð. Men dómarin, Oddmar Andreasen, metti ikki, at umstøður vóru til fótbóltsspæl. Tað var vorðið ov myrkt klokkan sjey, og so før hvør til sín, uttan at teir vistu, hvør før at spæla í 1. og 2. deild.

– EB/Streymur hevur myrkar búnar, og hjálpardómararnir høvdu ilt við at meta um rangstøður. Sjálvur hevði eg trupulleikar at síggja klokkuna, uttan tá ið eg før út undir ljósmastrarnar. Men áðrenn eg blásti av, tosaði eg við báðar liðformenninar. Um teir báðir høvdu verið sinnaðir at halda fram undir umstøðunum, sum vóru, so høvdu vit ikki sett okkum ímóti tí. B71 vildi halda fram, men EB/Streymur segði nei, og so blásti eg dystin av, sigur Oddmar Andreasen, sum leggur afturat, at fótbóltsspælið var gott, og at alt gekk heiðurliga fyri seg á vøllinum, sjálvt um so nógv stóð upp á spæl.

Kappingarnevndin hjá FSF viðgjørdi málið á fundi í Hannover fyrrapartin í gjár. Har varð gjørt av, at nýggjur dystur skal spælast á Sandi í dag klokkan 16. Harvið slepst undan myrkaspælið, sjálvt um tað skuldi komið har til, at tað verður neyðugt við longdari leiktíð og kanska brotssparkskapping.

At nýggjur dystur verður spældur hevur við sær, at EB/Streymur við dystarbyrjan samanlagt verður á odda 1–0. Støðan er tann sama, sum hon var, tá dómarin blásti illveðursdystin á Toftum millum B68 og B36 av fyrr í heyst.

Tað ber ikki til at bíða inntil vikuskiftið við dystinum. Eitt er, at bæði í B71 og EB/Streymi eru útlendskir spælarar, sum trippa eftir at sleppa til hús. Teir ferðaseðlarnar ber tað kanska til at broyta. Men tað ber ikki til at broyta altjóða fótbóltsskránna. U–19 landsliðið fer av landinum leygardagin, og tá vera tveir spælarar hjá EB/Streymi, Marni Djurhuus og Hans Pauli Samuelsen, við í ferðalagnum.

Tikið uppaftur

Karl Vidtfeldt, formaður í kappingarnevndini, heldur tað vera sera óheppið, at tað verður neyðugt at spæla nýggjan dyst. Men tá dómarin týsdagin metti, at umstøðurnar ikki vóru nóg góðar at halda fram, so er sambært reglunum einki annað at gera, enn at byrja dystin av nýggjum á Sandi.

Karl Vidtfeldt sigur, at møguleikin at nýta regluna, sum ber møguleika í sær bara at spæla ein dyst á uttanveltaðum vølli, varð nevndur. Sandoyingar høvdu einki ímóti tí, meðan teir í EB/Streymi vóru meiri ivasamir, og so helt FSF seg til tveir dystir.

– B71 hevði á aðalfundinum uppskot frammi um at broyta regluna fyri endaumfarið, soleiðis at bara ein dystur skuldi spælast. Teir komu við uppskotinum, eftir at B71 og Skála síðsta heyst høvdu spælt endaumfar. Tá hildu allir, at tað ver óheppið, at fótbóltsárið varð longt tvær vikur. Uppskotið vann ikki frama. Nú hevði tað ikki undrað meg, um uppskotið at broyta regluna fyri endaumfarið kom aftur fyri aðalfundin. So verður tað upp til feløgini at gera av, hvussu tað skal vera í framtíðini, sigur Karl Vidtfeldt úr Týsklandi.

ENDAUMFAR

B71-EB/Streymur 1-0 (0-0)

1-0: Símun Hansen, 59.

Dómari: Oddmar Andreasen

B71: Valdemar Nowicki - Ernst Løkjá, Páll á Reynatúgvu, Slawomir Radziemski - Arunas Mika, Krzystof Radziemski, Sverrir Kjærbo, Eli Hentze, Kári Sørensen (Jógvan Jón Petersen, 56.), Símun Hansen - Jónsvein Thomsen

Gul kort: Eli Hentze, 9. og Slawomir Radziemski, 34.

EB/Streymur: Gunnar á Steig - Hallur Jacobsen (Bárður Olsen, 80.), Andrzey Pacek, Esmar Eiðisgarð, Eyðfinn Joensen - Hans Pauli Samuelsen (Vinjard Dam, 60.), Ronnie Samuelsen, Jákup Martin Joensen, Marni Djurhuus - Sorin Anghel, Jón Sigurd Gleðisheygg (Christian Carlsson, 70.)

NSÍ fór við øllum skreytinum

Í teimum trimum steypakappingunum í yngru deildunum, sum eru avgjørdar tvey tey seinastu vikuskiftini, hevur NSÍ vunnið gull

STEYPAKAPPINGAR
Jóannes Hansen

Tað er ikki lukkuligt, sum NSÍ hevur gjørt um seg í steypakappingunum í ár. HB plagar at vinna dastið av kappingunum, men í ár er tað NSÍ. Fyrst vunnu teir løgmanssteypið á ólavsøku, og tvey tey seinastu vikuskiftini hava teir vunnið steypakappingarnar í dreingjadeildini, smádreingjadeildini og smágentudeildini. Kappingin hjá gentum 14-17 ár er útsett og verður spæld komandi vikuskifti.

Í finaluna eftir brotssparkskapping

Dreingjadeildin var avgjørd í høvuðsstaðnum síðsta leygardag. Spælt varð í tveimum bólkum. Í øðrum bólkinum vóru ÍF, HB og NSÍ. HB og NSÍ vunnu bæði 2-0 á ÍF. Innanhýsis dysturin millum HB og NSÍ endaði 2-2. So var neyðugt við brotssparkskapping fyri at finna út av, hvat av liðunum skuldi í finaluna. Ta kappingina vann NSÍ 5-4.

Í hinum bólkinum vóru B36, KÍ og B68. B68 vann 2-0 á KÍ, og B36 vann 4-0 á KÍ. Innanhýsis dysturin millum B36 og B68 endaði málleysur, og so var greitt, at finalan før at standa millum B36 og NSÍ.

Finaludysturin var á Argjum, og NSÍ vann 2-0, sum eisini var støðan í steðginum. Jóhan Petur Poulsen skoraði fyrra málið, og Tórur D. Djurhuus skoraði seinna málið.

Hetta var fyrsta ferðin síðani 1986, at NSÍ dreingirnir hava vunnið steypakappingina. Ítróttarsosialurin ynskir NSÍ dreingjunum hjartaliga tillukku.

FM vinnararnir úr VB luttóku ikki í steypakappingini. Í landskappingini endaði NSÍ á fjórða plássinum. Tað var um reppið, at teir undan summarsteðginum fluttu niður úr FM bólkinum og í økisbólk. Í august vóru teir á fótbóltsferð í Liverpool, og eftir ta ferðina før at ganga framá.

Smádreingirnir greipuvinnarar

Meðan 1. deildarliðið hjá NSÍ næstsíðsta leygardag var í Klaksvík og vann silvurmerkini í landskappingini, vóru smádreingirnir hjá NSÍ í høvuðsstaðnum. Ørindini vóru at taka lut í steypakappingini. Spælt varð í trimum bólkum. Bólkavinnararnir vóru AB, HB og NSÍ, sum í finalubólkinum spældu øll ímóti øllum.

Í fyrsta dystinum endaði tað málleyst ímillum HB og NSÍ. So vann HB 3-0 á AB. Setningurin hjá NSÍ var so at vinna meiri enn HB á AB, og tað eydnaðist. Úrslitið varð 4-0 til NSÍ, sum harvið var steypavinnari. Fyrr í heyst vunnu NSÍ smádreingirnir FM heitið. Ítróttarsosialurin ynskir NSÍ smádreingjunum hjartaliga tillukku við góða avrikinum.

Hetta er fyrsta ferðin yvirhøvur, at NSÍ hevur vunnið steypakappingina í smádreingjadeildini.

Marginalirnir við smágentunum

Í smágentudeildini varð steypakappingin síðsta vikuskifti í Runavík og á Toftum. Trý lið vóru í bólkinum á Svangaskarði. B68 vann 3-0 á B71, og ÍF vann 2-0 á B68 og 1-0 á B71.

Í Runavík var sera tepurt og spennandi. HB vann á NSÍ, men tær taptu ímóti EB/Streymi og spældu javnt ímóti B36, og so kom NSÍ í finaluna. Úrslitini vóru hesi: HB-NSÍ 2-1, EB/Streymur-B36 0-0, B36-NSÍ 0-1, HB-EB/-Streymur 0-1, B36-HB 0-0 og NSÍ-EB/Streymur 1-0.

Finalan var í Runavík ímillum NSÍ og ÍF, og har var eingin ivi. NSÍ vann 5-0, og harvið var greitt, at NSÍ fyri fyrstu ferð síðani tað í 1996 var farið undir steypakappingina í smágentudeildini, hevði vunnið. Ítróttarsosialurin ynskir NSÍ hjartaliga tillukku.

NSÍ dreingir. Steypavinnarar 2002. Standandi: Terji Hansen, sum var við í staðin fyri venjaran Finn Johannesen, Rógvi Hammer, Ken Hentze, Kári Bærentsen, Einar T. Hansen, Tórður Thomsen, Hjalmar Dalbúð, Høgni Petersen, Rógvi Nielsen, Anna Hansen. Húkandi: Jóhan Troest Davidsen, Magnus Knudsen, Justinus H. Hansen, Jóhan Petur Poulsen, Kenneth Johannesen og fremst Tórur D. Djurhuus

NSÍ smádreingir. Steypavinnarar 2002. Standandi: Øssur Dalbúð, Aljosa Sarsevic, Rógvi Højgaard, Sámal Einarson, Einar Hansen, Jóhan Troest Danielsen, Pætur á Líknargøtu, Sveinur Nielsen. Húkandi: Filip Hansen, Jann Martin Mortensen, Arnold Jacobsen, Bogi Løkin, Brian Aron Jacobsen, Pól Jóhannes Justinussen og Jens Joensen. Venjarin, Abraham Løkin, var henda dagin á 1. deildarliðnum hjá NSÍ í Klaksvík.

NSÍ smágentur. Steypavinnarar 2002. Standandi: Unn Hansen, Hansa Hansen, Jacoba Langgaard, Andrea Magnussen, Hjørdis Tórbjarnardóttir, Annika D. Petersen, Laila Lamhauge. Húkandi: Annika Klein, venjari, Lív Olsen, Heidi á Lakjuni, Poula Lassen, Aslaug Joensen og Heidi Sevdal